## Fríðtór Debes skal prædika í Afrika



Týsdagin fer Fríðtór Debes (myndin) til Kenya í Afrika at prædika. Hann verður burtur í umleið tríggjar vikur í Nakuru í Kenya, har føroyingarnir Malena, Jens og Jósva Meitilberg eru. Tey hava verið har nøkur ár, har tey m.a. hava arbeitt við einum barnaheimi og einum kvinnuheimi. Fyri tveimum árum síðani var Fríðtór saman við øðrum í Kenya og helt møtir. Hetta vóru sera væleydnaði møtir, har hópurin av fólki kom og nógv komu til trúgv.

## Vágafólk bjóða til vikuskiftismøtir í Miðvági

Hetta vikuskiftið verða vikuskiftismøti hildin í bygdarskúlanum í Miðvági. Tað eru Poul Færø og Dánial á Dul Jacobsen sum skipa fyri møtunum við stuðli frá missiónshúsunum og samkomunum í oynni. Møtini byrja í kvøld kl. 20 og halda fram til sunnukvøldið við talum, nógvum sangi. Hetta er fyrstu ferð at missiónshúsini og samkomurnar í Vágum standa saman um eina møtirøð. Sangluttøka er við eini trio, eini duett, solistum, sangbólkinum Ljós og gentukórinum G.O.G. Eftir møtini verður drekkamunnur.

# Tað er altíð nokk fyri hendu



*- Vit hava nokk at gera, siga norðdepilsmenninir, feðgarnir og handverkararnir Ditlev og Ludvík Lydersen*

**– Vit byrjaðu uppá hesi húsini mitt í summar. Og vit vænta at tey verða liðug í januar ella februar komandi ár, siga teir báðir ídnu handverkararnir, Ditlev og Ludvík Lydersen. Mikudagin í hesi vikuni arbeiddu teir í einum húsum uttarlaga í Hvannasundi. Tað ræður um at skunda sær, tí onnur arbeiði bíða teimum**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Hvannasund:** Klokkan er farin at nærkast 12 og einum góðum døgurðabita.

Hetta tykist tó ikki at nerva teir báðar norðdepilsmenninar og feðgarnar, Ditlev og Ludvík Lydersen. Tann fyrrnevndi býr í Norðdepli og hin á Viðareiði.

Við hesi nýggju húsini í Hvannasundi er alt gjørt fyri, at arbeiðið skal kunna ganga skjótt og væl. Framman fyri húsið stendur ein stórur arbeiðsskúrur við øllum tí, ið krevst til arbeiðið hjá einum handverksmeistara sum Krissfinn Lydersen.

Her er skrivstova, goymsla til amboð og annað, toilett og ein hitapumpa, ið hitar allan skúrin. Og her er eisini eitt stórt úrval av seymi og skrúvum, sum krevjast til bygging av einum slíkum sethúsum.

Teir báðir, Ditlev og Ludvík eru ídnir eftir at fáa hetta arbeiðið frá hondini. Men hjá teimum og arbeiðsgevara teirra, hinum bróðurinum og soninum, Krissfinni ræður um at arbeiða soleiðis at tað ikki gongur út yvir góðskuna.

– Vit mugu bara laga okkum eftir veðrinum. Í dag er ikki hugsingur um at arbeiða uttandura, siga teir báðir.

### Lív í bygdunum

Fyri eina so lítla bygd sum Hvannasund hevur tað sjálvandi sín áhuga, at fólkatalið veksur og at bygdin kann mennast á øllum økjum.

Í bygdini hevur kommunan gjørt sítt til at fólk skulu hava møguleika fyri at bú-